# Ovfarin og glað

**Eg eri sera glað og ovfarin av at fáa eina so dygga álitisváttan, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági um góða persónliga valúrslitið**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, fekk 31,4 prosent av góðkendu atkvøðunum á kommunuvalinum í Sandavági týsdagin. Næstan triðjuhvørja latna atkvøðu fekk hon perónliga. 449 atkvøður vórðu góðkendar, og ein var ógildað.

– Eg eri ógvuliga glað fyri, at fólk halda, at tað, sum eg havi staðið fyri og gjørt í bygdarráðnum hesi árini, hevur verið gott arbeiði. Øðrvísi kann úrslitið ikki skiljast, heldur Rósa Samuelsen.


*Rósa Samuelsen á borgarstjóraskrivstovuni í Sandavági mikumorgunin. Útlit eru fyri, at hetta eisini komandi fýra árini kann gerast arbeiðspláss hennara*
*Mynd: Edvard Joensen*

Nakra ávísa grund heldur hon ikki vera til hetta úrslitið. Hon hevur verið sjónlig alt skeiðið, og bygdarráðið hevur arbeitt væl saman, sigur hon. Tað fær borgarstjórin so løn fyri nú, vísir hon á.

Hon metir, at serliga tað, at nýggjur dagstovnur er komin, eins og at frítíðarskúlin er byrjaður, og at ungdómshús er á veg, avgjørt hevur gjørt sítt til úrslitið. Fríðkingin av bygdini hevur eisini havt sítt at siga, tá fólk hava valt, sigur afturvaldi borgarstjórin í Sandavági.

Rósa Samuelsen sigur, at enn er ikki tosað nakað um, hvat fer at henda í komandi valskeiði. Tó væntar hon, at hildið verður fram sum higartil, og okkurt er, metir hon, sum bendir á, at hon fer at halda fram sum borgarstjóri. Verður heitt á hana, tekur hon av, sigur hon. Hon er vald sjálvfimta av sjey á sínum lista. Tveir listar vóru.

– Vit hava ikki arbiett við meiriluta og minniluta í bygdarráðnum í farna skreiði, og tað ætli eg heldur ikki at gera í komandi skeiði, sigur hon. Mær dámar betri, at alt bygdarráðið arbeiðir sum ein heild.

Rósa Samuelsen metir, at tættari samstarv eigur at vera millum kommunurnar í Vágum. Eitt nú eigur reglugerðin fyri Felagskommununa at verða broytt, soleiðis at Felagskommunan fær størri heimildir.

Sum er, er bara talan um eina nevnd, sum ongar heimildir hevur. Sótu til dømis borgarstjórarnir í leiðsluni fyri Felagskommununi við ávísum rættindum, kundi hon verið brúkt í fleiri førum, enn nú er, heldur borgarsjórin í Sandavági.

Av lokalum málum í Sandavági er eingin ivi um, at skúlin er tað fremsta, sigur Rósa Samuelsen. Har eru álvarsligir hølistrupulleikar, og har má arbeiðast skjótt, sigur hon.

Nýggja bygdarráðið verður kallað saman nakað skjótt, sigur Rósa Samuelsen, sum fegin tekur við aftuvali í borgarstjórasessin í Sandavági.

# Borgarstjóraval í Vágum

**Allir tríggir borgarstjórarnir, sum stilláðu upp til kommunuvalini í Vágum, fingu flestar persónligar atkvøður, har teir stillaðu upp**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*


*Kommunusamanleggingin millum Bíggjar- og Sørvágs Kommunur varð undirskrivað í Tindhólmi í summar. Jógvan Páll Joensen, v.m. og Eivin Jacobsen, h.m., skrivaðu sum borgarstjórar í ávikavist Bø og Sørvági undir. Eivin Jacobsen stillaði ikki uppaftur hesaferð, og Jógvan Pál Joensen fekk flestar persónligar atkvøður í nýggju Sørvágs Kommunu*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Vágaborgrstjórarnir, Rósa Samuelsen, Jóan Pauli Federiksen og Jógvan Páll Joensen, fingu øll trý flestar atkvøður í bygdunum, har tey stillaðu upp.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, hevði eina prosentvísa framgongd upp á 98 prosent í mun til seinasta kommunuval.

Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági, hevði eina framgongd upp á heili 105 prosent í mun til seinasta val.

Triði borgarstjórin, sum uppstillaður var, var Jógvan Páll Joensen, borgarsjtóri í Bíggjar Kommunu, sum nú verður løgd saman við Sørvágs Kommunu. Hann stillaði tí upp í Sørvági, har hann fekk flestar persónligar atkvøður. Verður bert hugt at talinum í Bø, hevði Jógvan Páll Joensen eina framgongd upp á 94 prosent í persónliga atkvøðutalinum í bygdini. Tó skal viðmerkjast, at hann var einasta valevni í Bø til bygdarráðið í Sørvági.

Fjórði borgarstjórin í Vágum, Eivin Jacobsen, borgarstjrói í Sørvági stillaði ikki uppaftur til kommunuvalið hesaferð.

Kynsbýtið í Vágum er eitt sindur broytt í mun til seinasta val.

Í Sandavági stendur við. Har var borgarstjórin, Rósa Smauelsen, einsamøll kvinna i bygdarráðnum. Tað er hon eisini eftir valið týsdagin.

Í Miðvági sótu fýra kvinnur í gamla bygdarráðnum. Tvær teirra stilláðu ikki uppaftur, og ein varð ikki afturvald. Eftir sitir nú tann fjórða sum einsamøll kvinna í bygdarráðnum í Miðvági.

Í Sørvági sat ein kvinna í fráfarandi bygdarráði. Hon varð ikki afturvald. Men tvær aðrar eru nývaldar. Sostatt er kvinnuliga umboðanin í Sørvági tvífaldað. Tó skal viðmerkjast, at í Mykinesi var ein kvinna í bygdarráðnum, sum nú ikki er til meira, tí Mykines er løgd saman við Sørvági. Kvinnuligi bygdarráðslimurin í Mykinesi stillaði ikki uppaftur.



# Talgild heilsuskipan

**Tað verða Sam-teld og danska WM-data, sum í felag skulu veita og implementera talgildu heilsuskipanina**

TELDUSKIPAN
*tíðindaskriv*



*Einki er at ivast í, at tey á Samteld eru fegin um, at tað eydnaðist fyritøkuni at fáa risa-ordran upp á talgildu heilsuskipanina*

Hesum boðar Almanna- og Heilsumálaráðið frá í tíðindaskrivi í dag. Farið verður í holt við arbeiðið í januar 2005, og ætlanin er, at tey trý sjúkrahúsini og teir kommunulæknar, sum ynskja tað, innan árslok 2006 skulu arbeiða við talgildari heilsuskipan.

Við hesum verður altso lagt upp til, at tað verða kommunulæknarnir sjálvir, sum gera av, hvørt teir vilja nýta skipanina ella ikki.

Í tíðindaskrivinum verur sagt, at hetta gevur møguleikar at fremja samstarvið hinnan heilsuverkið. Somuleiðis verður sagt, at hetta fyri sjúklingarnar fer at merkja eina betraða tænastu. Til ber at samskipa viðgerðina av sjúklingunum, frá fyrstu ferð, tey fáa samband við heilsuverkið. Harumframt verða allar upplýsingarnar um ein persón savnaðar á einum stað, til fyrimunar fyri bæði sjúklingar og heilsustarvsfólk.

## Danskur og føroyskur førleiki

Sam-teld og danska fyritøkan WM-data skulu veita og implementera ta nýggju skipanina, sum hevur heitið Cosmic, og sum svenska fyritøkan CAMBIO hevur ment. Higartil hevur skipanin hjá CAMBIO upp ímóti 30.000 brúkarar. Arbeiðið verður gjørt sum ein verkætlan, har dentur verður lagdur á føroyskan førleika í neyvum samstarvi við serfrøði úr Danmark innan KT-skipanir í heilsuverkinum.

WM-data er ein av oddafiskunum innan KT-skipanir til heilsuverkið í Danmark, og hevur í fleiri enn 20 ár arbeitt miðvíst við KT-loysnum til arbeiðsgongdir á sjúkrahúsum. Í dag veitir WM-data talgildar heilsuskipanir til fleiri amt í Danmark.

Sam-teld hevur drúgvar royndir við KT-loysnum innan almennu umsitingina og hevur tí nógva vitan um tey krøv, sum verða sett til talgildar skipanir á hesum økinum.

# Á tónleikaháskúla fyri 1/2 prís

Danski tónleikaháskúlin Vestbirk Højskole, bjóðar nú øllum næmingum at ganga komandi skúlaskeið fyri hálvan prís. Talan er um ein nýmótans háskúla, har kreativitetur og nýhugsan eru í hásæti




*Umframt at geva helvtina av kostnaðinum í avsláttri, bjóðar Vestbirk Højskole nú eisini tvær nýggjar breytir, nevniliga Singer/Songwriter og fólkatónleik.*

Háskúlin Vestbirk er ein tónleikaháskúli, ið bjóðar breytirnar: rock, funk/fusion, jazz, teldutónleik, crossover og musical. Afturat hesum breytum verða tvær nýggjar á skránni komandi skúlaskeið. Nevniliga Singer/Songwriter og fólkatónleikur.

Um Singer/Songwriter breytina, sigur skúlin, at henda er ætlað ungum, gávaðum tónleikarum, sum ynskja at skriva teirra egnu løg og tekstir, men sum kanska hava tørv á hjálp, fyri at koma í gongd.

Fólkatónleikarabreytin bjóðar møguleikar innan bæði tann klassiska, akustiska fólkatónleikin, men eisini innan tann nýggjara og elektriska tónleikin.

Komandi skúlaskeið byrjar 16. januar og endar 4. juni 2005. Tilsamans er talan um 20 vikur, sum nú fáast fyri kostnaðin av einans 10 vikum.

Um nærri upplýsingar ynskjast, ber til at fara inn á heimasíðuna: www.info@vestbirk-hojskole.dk . Tlf.nummarið er +4575781171 og faxnummarið, +4575780090

–eys–

# Vesper - aftansangur - á Glyvrum og á Eiði

AFTANSANGUR
*Tíðindaskriv*

Sunnukvøldið hin 14. november kl. 20 verður aftansangur (vesper) í Glyvra kirkju, og sunnukvøldið hin 28. november kl. 20 í Eiðis kirkju við Kór Glyvra kirkju.

Fyrimyndin er aftansangur í ensku (anglikansku) kirkjuni, sum er ein daglig tíðarbøn, har dentur verður lagdur á lovsong, Dávidssálmar, Bíbliulestur og bøn. Í miðøldini vóru hesar gudstænastur fleiri í tali, og vóru róptar tíðarbønir, av tí at tær vóru hildnar ávísar klokkutíðir á degnum til tess at halga dagin.

Enski erkabiskupurin, Thomas Cranmer (1489-1556), ið var ein av teimum týdningarmiklu trúbótarmonnunum í ensku kirkjuni, avmarkaði hesar tíðarbønir til tvær: Morgun - og aftansang (mattins og vesper). Enski formurin fekk sítt sermerkta snið, sum ikki er at finna í øðrum kirkjum, við tað at Cranmer tók ymiskar partar úr teimum ymisku tíðarbønunum, sum í miðøldini vóru vornar 8 í tali, og legði tær saman til tvær. Hesin vakri og hátíðarligi formurin fyri morgun - og aftansang verður við smávegis broytingum framvegis nýttur í ensku kirkjuni og verður nú royndur her heima á klettum.

Hesi sunnukvøld syngur Kór Glyvra kirkju ein Dávidssálm, Lovsong Mariu og Lovsong Símeons. Skiftisongur eftir enska tónaskaldinum William Smith (1603-45) verður sungin av prestinum og kórinum. Harafturat verður sálmasangur, Bíbliulestur og bøn.